# Leivur Ellingsgaard havt handil síðani 1951




*Leivur Ellingsgaard byrjaði handil í 1951*
*Mynd: Jóannes N. Poulsen*

**Hjá Leivi Ellingsgaard í Klaksvík er ur, optik og gávuhandilin gingin í arv, men stovnarin er enn fúsur og við í virkseminum**

Ein av kendu handlunum innan ur, optik og gávulutir, er Leivur Ellingsgaard í Klaksvík.

Leivur byrjaði í 1951, men helt tá til undir trongligum umstøðum. Í 1955 vórðu núverðandi handilshúsini bygd, og handilin er har enn, men eitt skifti var tað eisini har, ið familjan Ellingsgaard búði, til hon seinni fluttu í onnur hús.

### Børnini taka yvir

Sonurin var útlærdur sum optikari í 1987, og dótturin sum urmakari í 1991, og tey hava síðani verið við til at dríva handilin. Dótturin tekur sær, umframt av urunum, eisini av innkeypi og líknandi.

Partur av úrvalinum er eisini gávulutir, og hetta hevur altíð verið ein partur av tí, ið Leivur Ellingsgaard hevur havt at bjóða.

### Skjótt 50 ár

Leivur Ellingsgaard byrjaði í 1951, og nærkast fyritøkan sostatt teimum 60 árunum.

Leivur Ellingsgaard sjálvur er »still going strong«, og er enn partur av virkseminum.

Fyritøkan hevur verið í menning øll árini, men sum ein handil, ið hevur nógv ár á baki, so hava tey upplivað tíðir, har tað er gingið við, og har tað er gingið ímóti.

Hóast Klaksvíkin í hesum døgum kanska upplivir nakað av niðurgongd, so ætla tey hjá Leivi Ellingsgaard sær ikki at sita hendur í favn, og enn hava tey meira enn nóg mikið at gera, og óivað er stórur møguleiki at finna røttu jólagávuna hjá Leivi Elingsgaard í Klaksvík.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*










